# Anne Graham Lotz í fótafetum faðirsins

**Leygardagin 8. mai var stór kvinnuráðstevna í Falkonerteatret í Keypmannahavn, har Anne Graham Lotz, dóttir heimskenda evangelistin Billy Graham, talaði. Nógv føroysk andlit vóru at síggja á hesi ráðstevnu**



**Øssur Berghamar**
*Keypmannahavn*



*Anne Graham Lotz (h.m.) á tíðindafundi í Keypmannahavn hósdagin 6. mai. Saman við henni er Bitten Schriver, leiðari fyri OM-felagsskapin í Danmark*

Ikki kemst uttanum, at heimskendi evangelisturin, Billy Graham, hevur havt eina ómetaliga stóra ávirkan á okkara samtíð. Hann hevur talað til túsundtals skarar í stórbýum kring allan heimin, og sjálvur minnist eg fundarrøð hansara í Keypmannahavn í 1965, tá fleiri túsund fólk - harímillum nógvir føroyingar - savnaðist fyri at hoyra Billy Graham tala.

Tí hevði tað eisini serstakan áhuga, at dóttirin, Anne Graham Lotz, skuldi vitja her í býnum og tala í Falkonercentrinum. Talan var um ein stevnudag, sum nakrir kristnir felagsskapir skipaðu fyri. Dagurin var serliga ætlaður kvinnum, men eisini mennirnir kundu vera við. Og hendan møguleikan nýtti undirritaði og aðrir við honum.




## Gleddist um føroysku luttøkuna

Hósdagin var tíðindafundur, har Anne Graham Lotz, sum er 54 ára gomul, greiddi eitt sindur frá bakgrund síni og svaraði spurningum. Tað var eyðsæð, at hon líktist ikki sørt pápa sínum – bæði í útsjónd og framførslu. Væl fyrireikað, skjótt hugsandi og greitt talandi.

Eg fekk høvi til at heilsa upp á Anne Graham Lotz, og greiddi henni frá, at nógvir føroyingar fóru at koma at lurta eftir henni. Jú, hetta hevði hon fingið at vita og hetta gleddi hana nógv. Hon var eftir øllum at døma greið yvir, at teir komu langa leið. Seinni skilti eg, at hon mátti hyggja í heimskortið fyri at fáa greiði á, hvar Føroyar vóru.

## Ein blandaður flokkur

Annars var flokkurin, sum savnaðist í Falkonercentrinum leygardagin ein sera blandaður skari. Har vóru fólk úr ymiskum kirkjum og samkomum – talið segðist at vera um 800 fólk. Og teirra millum vóru nógvir føroyingar.

Einstøk føroysk ferðaløg høvdu lagt leiðina til Keypmannahavnar. Eitt nú vóru nakrar kvinnur úr samkomuni Lívdin í Hoyvík. Men eisini vóru fleiri kvinnur úr Klaksvík og úr Eysturoynni. Harumframt var eisini eitt fitt tal av útisetum við, so tú sást føroyskar bólkar standa í ymiskum krókum og samtala – bæði áðrenn og aftan á fundirnar.

## Ein viðkomandi boðskapur

Anne Graham Lotz helt tríggjar talur hendan leygardagin. Hon talaði út frá seinastu bók bíbliunnar, Opinbering Jóhannesar. Evnið var »Lítandi inn í framtíðina við Jesusi.«

Afturvendandi boðskapurin var, at eitt livandi samband við Jesus er lívsneyðugt fyri eitt satt andaligt lív. Nógvar kirkjur og samkomur eru stívnaðar í siðum og ritalum. Og úrslitið er hareftir – eingin verulig kraft.

Áhoyrararnir vóru mintir aftur og aftur á, at krossur Kristusar er ein týðandi miðdepul í lívi hins kristna. Tí tað er bert har syndafyrigeving og reinsan er at fáa. Eisini undirstrikaði hon týdningin av dagligari bøn og bíbliulesnaði. Hóast Anne Graham Lotz umtalaði seg sjálva sum eina vanliga húsmóðir, var tað skilligt, at júst hetta er ein berandi partur av hennara egna lívi.

## Evangeliskur tráður

Fruktin fellur ikki langt frá trænum – plaga vit at siga. Og tað var eins og orðavalið hjá Anne Graham Lotz stundum minti meg á tað, sum eg havi hoyrt pápa hennara siga. Men uttan at tað tók nakað av boðskapinum. Tvørturímóti – tú vart mintur á tað grundleggjandi í evangeliinum. Og Anne Graham Lotz var eisini sera erlig og opinskárað, tá ið hon talaði um egnu royndir sínar.

Tað kom eisini fram á tíðindafundinum, har hon m.a. segði: »Fyri at eg kundi vera ein kristin, so var tað ikki nóg mikið, at eg var dóttir Billy Graham. Eg mátti sjálv sum ein lítil genta koma til Harran og siga, at eg var hørm um mínar syndir - og biðja Jesus um at koma inn í hjarta og lív mítt.«

## Unn Zachariassen og Lív Clementsen um kvinnuráðstevnuna

**Um vikuskiftið vóru umleið 30-40 føroyingar í Danmark og lurtaðu eftir Annu Graham Lotz, sum talaði fyri umleið 800 áhoyrarum í Keypmannahavn. Teirra millum vóru Unn Zachariassen og Lív Clementsen úr Lívdini í Hoyvík**

Vit eru samdar um, at boðskapurin var greiður og viðkomandi. Evnið, sum hon tosaði um, var hvussu vit kunnu brúka tíð í gerandisdegnum, at vera saman við Jesusi, og at hava eyguni vend á Jesus í øllum lívsins umstøðum. Tað var eisini sera inspirerandi at hoyra, hvussu Anne Graham Lotz, út frá Opinberingini, við eldhuga tosaði um himmalin og hvat bíðar teimum, sum hava sett sítt álit á Jesus her.

Undirvíst var eisini í hvussu trúgvandi kunnu læra at lesa og granska Bíbliuna sjálv. Umframt sera eggjandi talu og undirvísing var tíð til góðan lovsong og gott samfelag.



*Nakrar av føroysku kvinnunun í Falkonerteatret leygardagin 8. mai, f.v. Unn Zachariassen, Ása Bech, Anna av Rana, Evi Poulsen, Anja Hansen, Rakul Eysturtún, Lív Clementsen, Anna Háberg og Jona Nielsen*



*Her heilsar Unn Zachariassen upp á Annu Graham Lotz*



# NØVN Í VIKUNI

Telefon 341800 - Fax 341801 - Fartelefon 216135
e-mail: maggi@sosialurin.fo

Á hesum síðum bera vit tíðindi um merkisdagar, so sum rundar føðingardagar, brúdleypsdagar, starvssetanir o.t.

Pól Skarðenni, listamálari:

## Listaframsýning í Glarsmiðjuni



*Pól Skarðenni listamaður málar har sum myndaevnið er, her málar hann í gomlu Havnini*

*Mynd: Jens Kristian Vang*

**Sunnudagin 16. mai 2004 kl. 15.30 letur Pól Skarðenni listamaður upp málningaframsýning í Glarsmiðjuni í Bøgøtu 16 í Havn**

Á framsýningini vera umleið 30 oljumálningar, har høvuðsevnið er Tórshavn.

Allir málningarnir eru málaðir úti og á staðnum framman fyri myndaevnið. Hesin háttur við at mála úti verður nevndur »plain-air« og verður brúktur nógvastaðni – serliga í USA.

Pól er klaksvíkingur og útbúgvin verkfrøðingur, hann arbeiðir sum listamaður og býr í Vatnsoyrum.

Ferniseringin verður sunnudagin frá kl. 15.30-17.30, annars verður framsýningin opin alla viku 21 soleiðis: Mánadag 15.00 - 17.30, týsdag – fríggjadag 10.00 - 17.30, leygardag 10.00 - 12.30.

## Elise Holm 60 ár



Í dag, fríggjadagin 14. mai, fyllir Elise Holm í Vági 60 ár. Hon er ættað úr Vinding í Danmark, dóttir Børge Kokholm úr Vinding og Else Marie Kragelund úr Tanderup Kjær.

Í 1968 tók Elise læraraprógv í Nørre Nissum. Hon var lærari í Spjold í eitt ár, í Vági í tvey ár, í Santa Jørgen Skole í Holstebro í tvey ár, og síðani 1973 hevur hon aftur verið lærari í Vági.

Elise møtti Óla Holm, tá eisini hann las til lærara í Nørre Nissum. Tey giftust og eru búsett í Vági.

## Minningarhald

Minningarhald fyri Jens Frederiksen,
ið hvarv 6. apríl 2004, verður í Vesturkirkjuni
leygardagin 15. mai kl. 16.
Tey ið ynskja at minnast Jens,
kunnu geva eina gávu til sonin, Kára,
á konto í Føroya Sparikassa.

*Familjunnar vegna*

**Connie og Kári**

## Tøkk

Øllum tykkum, sum á ymsan hátt gleddu meg á 80 ára føðingardegnum sendi eg mína hjartans tøkk og Harrans signing.

**Blíðar heilsanir**
**Petra Holm**

### Dagurin

**14. mai. Kristjan.** Teir vita einki um nakað halgimenni við hesum navni. Navnið er latínskt, gjørt eftir grikska navninum *Kristos*, sum aftur er týðing av tí hebráiska *Messiah*, ið merkir *salvaður*.

Leygardagin 15. mai 2004 taka vit við rakstrinum av cafeteria í ítróttarhøllini á Skála. Í tí sambandi verður

**móttøka**

leygardagin 15. mai frá klokkan 14.00 til 17.00.



100 tey fyrstu fáa hvør sín lutaseðil. Drigið verður um ein vinning beint eftir mótasýningina.

Klokkan 15.00 verður mótasýning við klædnahandlunum Josi og Suðurgarð av Skála, og framsýning av Aloe Vera húðrøkt.

Leygardagin letur eisini upp framsýning í Cafeteria við málningum hjá Kristinu Nysted. Framsýningin verður opin í ein mánað.

**Sp/F JANUSU**
FO-480 Skála
tlf: +298 441850, fartel.: +298 741850
e-mail: janusu@janusu.fo, web: www.janusu.fo